# TWR KVINNUR VIÐ VÓN

## Bønaráheitanir fyri sept. 2024 – Miðasia, Norðurafrika og Miðeystur

1. Harri, Tú sendi Jesus, fyri at vit kundu verða sett í frælsi. Halt arbeiðinum uppi, ið er til frama fyri tey, ið eru offur fyri menniskjahandli, at tey kunnu verða sett í frælsi, bæði likamliga og andaliga. (Lukas 4:18-19)
2. Harri, hjálp monnunum í Turkmenistan at bera seg rætt at móti konum sínum við kærleika, mildleika og trúskapi. Styrk tær kvinnur, sum sakna slíkt frá makum sínum. (Efesusbrævið 5:25)
3. Harri, vit biðja, at kirkju- og samkomuleiðarar í Kasakstan kunnu verða sameintir í Tær. Ger teir førar fyri at samstarva hvør við annan og loysa ósemjur sínar á náðiríkan hátt. (1. Korintbræv 1:10)
4. Gud, veit kvinnum í Marokko, ið hava samfelagsligar og mentanarligar avbjóðingar, tryggleika og virðing. Lat tær fáa møguleika at fáa skúlagongd og yrkisvenjingar. (Esaias 41:10)
5. Faðir, verj tey í Usbekistan, ið eru offur fyri kynsligari og kroppsligari misnýtslu í familjum sínum. Gev teimum treystleika at vinna á hesum óndskapi. (2. Sámuelsbók 22:3-4)
6. Faðir, lat toymi okkara í Miðeystri hava eina jaliga ávirkan á arabisku kvinnurnar gjøgnum teirra talgildu miðlar, so at tær fáa vísdóm og styrki við Orði Guds. (Orðtøkini 31:25)
7. Harri, veit familjum í Kirgisia, ið eru atskildar, tí tey eru flutt til annað land, linna í líðingunum og vón. Lat onkran taka sær av kvinnunum og børnunum, so tey fáa til dagsins uppihald. (Rómbrævið 12:12)
8. Faðir, frels kvinnur í Tadsjikistan. Lat tær søkja kærleika, vón, trúgv og hjálp frá Jesusi Kristusi. (Sálmur 121:1-2)
9. Harri, vit biðja fyri hjúnaløgum í Karakalpakstan, ið eru rakt av sundurlesing, hjúnaskilnaði og drykkjuskapi. Grøð hesi hjúnabond og endurnýggja hesi hjún. (Matteus 19:6)
10. Gud, lat kirkjur og samkomur í Turkalandi skína í hesum torføru tíðum, nú mong hava vent sær burt frá Tær. Lat tey trúgvandi kristnu í Turkalandi endurspegla Gud í sínum nærsambondum, so at teirra samfeløg verða nomin av Tær. (Matteus 5:14-16)
11. Harri, lat kvinnur í Norður Kypros venda sær til Tín, fyri at veita teimum góð størv og nøktandi løn. (Filippibrævið 4:19)
12. Gud, nógvar kvinnur í Turkmenistan fremja gandakynstur fyri at fáa grøðing, ella til frama fyri menn sínar. Lat tær koma at kenna sannleikan og verða settar í frælsi frá myrkursins maktum. (5. Mósebók 18:10-12)
13. Harrri, vit biðja, at trúgvin hjá teimum nýfrelstu í Kasakstan verður styrkt, og at tey vilja líta á Harran av øllum hjarta sínum. (1. Korintbræv16:13)
14. Miskunsami Gud, verð hjá kvinnum í Oman, ið eru raktar av harðskapi orsakað av kyni, vernd, rættvísi og grøðing. (Orðtøkini 18:10)
15. Harri, vit biðja, at kvinnur í Usbekistan kunnu viðurkenna sín sanna samleika og virði í Tær, hóast neiliga hugburðin, ið summir av monnum teirra og eisini aðrir menn hava**.** (1. Mósebók 1:27)

16. Gud, frels unga ættarliðið í Kirgisia. Lat tey tráa eftir at fylgja Tær av heilum hjarta, ikki av siðvenju, men tí tey hava samband við Teg. (Matteus 3: 8-10)
17. Gud, vit biðja fyri tajikiskum gentum og konum, sum ikki hava atgongd til nakra skúlagongd grundað á mentanarliga og átrúnaðarliga siðvenju, og sum ikki hava nakran í familjuni ella samfelagnum at tala teirra søk. (Sálmur 32:8)
18. Faðir, vit biðja, at kvinnur í Karakalpakstan kunnu sleppa av við skuldarkensluna, ið tær líða undir, at tær ikki eru nóg góðar sum konur og mammur. (Sálmur 31:2 – ensk: 31:1)
19. Gud, vit biðja um eina andaliga veking og vøkstur millum kvinnur í kirkjum og samkomum í Tunesia, og fyri kvinnuligum kirkju- og samkomuleiðarum í Egyptalandi, at tær fáa styrki og áræði. (2. Pætursbræv 3:18)
20. Faðir, vit biðja, at kristnar familjur í Turkalandi kunnu hava álit á hvørjum øðrum. Lat Anda Tín sameina tey í kærleika. (Kolossebrævið 3:14)
21. Gud, gev kvinnum í Libanon, sum eru raktar av áhaldandi fíggjarligari kreppu, vón, grøðing og til lívsins uppihald. Lat evangeliið náa tær, ið ikki kenna Teg, og geva teimum sannan frið.(Sálmur 34:18-19; ensk 34:17-18)
22. Harri, vit biðja Teg um at hjálpa kvinnunum í Karakalpakstan at raðfesta Teg fremst í lívinum, og at koma saman regluliga at tilbiðja Teg, hóast tær hava annað at gera. (Hebrearabrævið 10:25)
23. Takk, Gud, fyri, at ein lóg í Kasakstan er samtykt at steðga innanhýsis harðskapi. Um ein kona í dag boðar myndugleikunum frá harðskapi, fer tann, ið fremur harðskap, sannlíkt at verða revsaður. (Kolossebrævið 3:19)
24. Harri, varðveit kvinnur í Miðeystri og gev teimum dirvi í royndunum at virka fyri sínum grundleggjandi rættindum. Lat toymi okkara náa tær við evangeliinum, so tær kunnu finna satt frælsi í Tær. (Josva 1:9)
25. Himmalski Faðir, gev teimum kristnu trúgvandi í Usbekistan vísdóm og dirvi at boða evangeliið. Leið tey til teirra, ið eru opin fyri Tær. (Jákupsbræv 1:5)
26. Harri, gev leiðarunum í Kirgisia vísdóm, so teir kunnu broyta undirvísingar- og heilsuskipanina, so tey treingjandi fáa hjálp. (Fyrra Kongabræv 3:9)
27. Vit biðja fyri andaligum vøkstri og samfelagi millum kristnar trúgvandi kvinnur í Jordan. Harri, lat tær verða fyltar við Tínum Orði og boða kvinnum sannleikarnar í Orðinum í sínum nærumhvørvi. (Kolossebrævið 1:10)
28. Gud, veit einkjum og einligum mammum í krígsraktu økjunum í Jemen tryggleika, og útvega teimum til lívsins uppihald. Lat tey kristnu trúgvandi har finna styrki og vón í Tær. (Sálmur 91: 1-2)
29. Faðir, styrk tajikisku kvinnurnar, ið búgva í bygdaløgum, og verða forfylgdar av familjum sínum, tí tær trúgva á Kristus. (Matteus 5:11)
30. Vit biðja, at tey, ið líða likamliga og andaliga í Turkalandi, kunnu finna grøðing og lív í Tær, Harri. Lat tey, sum pínast verða loyst frá øllum tí, ið plágar tey. (Rómbrævið 8:2)

## Grein til umhugsan - September 2024

# Halt fram at kalla á Harran

Hava tit nakrantíð hugsað um, hvussu tit høvdu borið tykkum at, um tit vóru atsøkt fyri tykkara trúgv? Eg minnist sera væl fyrstu ferð, tá ið henda hugsan kom til mín.

Eg las bókina hjá Richard Wurmbrand**:** *Tortured for Christ* (*Píndur fyri Kristi skuld*), aftrat tí, at eg ikki kundi lata vera við at fella tár, kundi eg heldur ikki steðga við at hugsa, hvussu eg hevði borið meg at, um eg var hann. Richard varð settur í fongsil fyri at hava framt tey brotsverk at hava havt kristiligar fundir og at vitna – bæði vóru ólóglig undir tí ateistiska, kommunistiska einaræðisstýrinum í Rumenia. Hann mátti tola 14 ár í fongsli og píning. Kona hansara, Sabina, mátti líða 3 ár í arbeiðslegu.

Hvør partur av søguni var hugvekjandi og avbjóðandi, og vísti greitt á Guds náði**.** Tað var náði Hansara, ið bar tey ígjøgnum og gjørdi tey før fyri at standa trúføst fyri Kristus. Tá ið eg var ung trúgvandi, myndaði lívssøga Wurmbrands bønarlív mítt, tí hon læt upp eygu míni fyri veruleikanum av forfylging, og at brøður og systrar okkara skuldu teppast.

Mong ár eru liðin, síðani handa bókin varð skrivað; tó,  heldur forfylging fram at vera ein veruleiki um allan heimin. Brøður og systrar okkara fara ígjøgnum ósigiligar ræðuleikar, og verða tept á mangan hátt. Eg dugi illa at ímynda mær, at fólk í summum londum kunnu enntá ikki biðja hart! Tað merkir ikki, at tey eru tigandi. Tey halda fram at tosa, sum  ein av okkara leiðarum greiddi frá: “Vit trúgva, at Gud hevur tamarhald á øllum, og vit vóna, at  tað fær tey trúgvandi at koma enn meira saman, so at tey verða sameind**,** og evangeliið fer víða og verður boða enn meira!” Tey halda fram at kalla á Kristus, og biðja ikki einans fyri teimum sjálvum, men eisini fyri øðrum.

Tað er eyðsýnt, at tey taka Guds náði til sín,  júst so sum Paulus segði frá í 2.Korintbrævi 12:9-10: “Men Hann segði við meg: “Náði Mín er tær nóg mikið; tí kraft Mín verður fullkomin í veikleika.” – Tí rósi eg mær helst av veikleika mínum, fyri at kraft Kristusar kann hvíla á mær. Og tí havi eg gott mót í veikleika, í ringari viðferð, í neyð, í atsóknum, í angist fyri Kristusar skuld; tí táið eg eri veikur, eri eg sterkur.”

Meðan flest okkara ikki hava verið atsøkt, kunnu vit hava kent, at  fleiri trýst og tær mongu málmiklu røddirnar rundan um okkum hava fingið okkum at tiga. Kanska hava vit mist rødd okkara av onkrum fyrrverandi skelki, ella tí vit hava verið illa viðfarin. Ella kanska kendu vit okkum ikki nóg týdningarmikil til at verða hoyrd! Alheims Gud hoyrir brøður og systrar okkara enntá meðan tey verða atsøkt.

Henda vissa gevur stóra gleði og troyst. Harrin hoyrir okkum! Hann gevur hvørjari forbøn, ans. Hann lurtar væl eftir hvørjum kvølfullum og vónleysum rópi, ið kemur úr hjarta okkara. Hann hoyrir okkum, hóast røddin svíkur.

“So kemur eisini Andin veikleika okkara til hjálpar, tí vit vita ikki, hvat vit skulu biðja um, sum biðið eigur at verða; nei, Andin sjálvur biður fyri okkum við suffum, ið ikki kunnu sigast. Og Hann, ið rannsakar hjørtuni, veit, hvat tráan Andans er; tí eftir vilja Guds biður Hann fyri hinum heilagu.” (Rómbrævið 8: 26-27)

Kann eg eggja tykkum til at tosa við Harran um øll tykkara viðurskifti ?

Áðrenn orðið er til á tungu tíni, kennir Hann tað til fulnar. (Sálmur 139:4)

Hann lurtar eftir rødd tíni.

Í undurfulla kærleika Hansara,

Susie Pek

Altjóða leiðari fyri TWR *Kvinnur við Vón*

***KVINNUR VIÐ VÓN***

**twrwomenofhope.org**

## Undirvísa, lívga, útgera kvinnur til at læra, biðja, lurta, vaksa og geva

**Fíggjarstuðul:**

**EvR (Evangeliska Røddin) hevur konto í Betri Banka nr. 9181 000 533 7145**

**til at flyta pening tilskilað til TWR (Trans World Radio).**

**Allur stuðul, sum kemur inn á hesa konto fer óskerdur til arbeiðið hjá TWR.**

**TWR PO Box 12, 82002 Bratislava 22 – Slovakia — twre@twr.org**